# Daewoo Tacuma – nú eisini sum vørubilur

## Daewoo / GM avtalan



Eftir samráðingar í fleiri ár er nú ein avtala gjørd millum General Motors og koreansku Daewoo bilverksmiðjuna. Avtalan tryggjar framleiðsluna av Daewoo bilunum og menning av nýggjum modellum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## GM er størst



General Motors er, saman við Suzuki og Saab, heimsins størsti bilframleiðari. Toyota er nr. 2 og VW konsernin nr. 3. Ford saman við Mazda eru nr. 4.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiat í Kina



Fiat og kinesiski samstarvsfelagin Yuejin Motor Group eiga hvør sína helvt av fyritøkuni, Nanjing Fiat, ið eru byrjaðir at framleiða og marknaðarføra Fiat Palio í eini nýggjari útgávu.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Hesin Daewoo Tacuma, ið bleiv sýndur fram á bilaframsýningini á Hálsi, var bygdur um til vørubil*

**Daewoo Tacuma, ið kom á marknaðin í fjør sum ein rúmligur MPV, fæst nú eisini sum vørubilur. Talan er um ein væl útgjørdan bil við góðum koyrieginleikum. Bilurin varð sýndur fram á bilaframsýningini í Ítróttarhøllini á Hálsi seinasta vikuskifti**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ein fyrimunur við at gera ein MPV um til vørubil er tann, at vørurúmið verður høgt til loftið og arbeiðsligt. Tacuma er onki undantak í so máta, vørurúmið er rúmligt og lætt er at handfara vøru inn og út úr bilinum. Motorurin er ein 2.0 litur við 127 hk.

Sum vørubilur fæst Tacuma úr kr. 124.900 uttan MVG. Bilurin kann síggjast og roynast hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.



*Vørurúmið er rúmligt og lætt er at handfara vøru inn og út úr bilinum*

# Ford Fiesta – kemur fyrr enn væntað

*Nýggi Ford Fiesta kemur nú fyrr enn væntað. Talan verður um ein størri, tryggari og munandi meira komfortablan bil enn forgangarin*



**Ætlanin var at nýggi Ford Fiesta skuldi koma á norðurlendska marknaðin í september. Í einum tíðindaskrivið frá Ford verður sagt frá, at framleiðslan í týska býnum Køln hevur gingið so gott, at bilurin verður her fyrst í juni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fiesta verður í allar mátar ein størri bilur, bæði longri, breiðari og hægri. Í fyrstu atløgu kemur einans útgávan við 5 hurðum á marknaðin, men væntandi kemur hann eisini við 3 hurðum í 2003. Framyvir verða eisini aðrar útgávur bygdar yvir Fiesta plattformin. Prísirnir verða nakað hægri enn á forgangaranum, men talan er eisini um ein størri, tryggari og munandi meira komfortablan bil.

Vit frætta meira um nýggja Fiesta tá teir fyrstu bilarnir koma higar til lands.






Bergshav Sp/f

*»Bergina« er oljutangaskip bygt í 1982. LOA 265m og BT 77.704. Siglingarøki er Norðsjógvurin, Norðurevropa og Skandinavia.*

Søkt verður eftir 1. stýrimanni

SP/F Bergshav søkir eftir dugnaligum 1. stýrimanni til oljutangaskipið »Bergina«.

Fyrimun hava umsøkjarar ið hava:

- Royndir frá tangaskipi
- Skeið í DP
- STCW-góðkent trygdar- og brandskeið
- Trygdarskeið við oljutangaskipi
- Góðkenda læknaváttan (bláa bókin)
- Góðan kunnleika til enskt og skandinaviskt mál

Áhugað verða vinarliga biðin um at senda skrivliga umsøkn til:

SP/F Bergshav
Niels Finsensgøta 23
FO-100 Tórshavn

Tel 31 85 31

*SP/F Bergshav er dóttirfelag hjá Bergshav Management í Noreg, sum m.a. eigur og rekur 14 tangaskip.*

REPRO-Z · 319540

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Shetland Cruise 2002 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
team85

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ...
(í lágárstíð) 1.149,- fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
úr einans ...
(í lágárstíð) 746,- fyri hvønn



Privat gisting
úr einans ...
(í lágárstíð) 878,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

*Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu*

*Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.*



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo